

## Danskur grunnur hjálpa útflutningi

Fríggjadagin vóru landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl, og umboð fyri føroyska útflutningsvinnu, á fundi í Eksport Kredit Fonden fyri at kanna møguleikarnar hjá føroyskum fyritøkum at brúka eksportkreditskipanir hjá Eksport Kredit Fonden. Niðurstøðan er, at hesin grunnurin hevur skipanir, ið føroyskar fyritøkur kunnu brúka. Partarnir eru samdir um at kanna, hvørjir møguleikar eru fyri at fáa í lag aðrar skipanir, sum hóska til tær serligu umstøðurnar, ið eru í Føroyum, tá tað snýr seg um at fíggja og veita trygd í sambandi føroyska útflutningin.

# Tollvald nýtt amboð ímóti smugling

**Nú kann tollvaldið í Føroyum fara beinleiðis inn á telduna og síggja hvør ferðast og sostatt ber til at hyggja eftir um tað er onkur, sum ferðast merkiliga ofta**

RÚSEVNASMUGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður alsamt tórførari og tórførari at verða rúsevnasmuglari í Føroyum.

Men tað er eisini ætlanin, tí tollvaldið roynir alla tíðina at brynja seg sum frægast í bardaganum ímóti smuglingini.

Og fyri nøkrum fáum døgum síðani fekk tollvaldið aftur eitt nýtt amboð í stríðnum ímóti smuglingini. Og tað er eitt ógvuliga hent amboð, sum hevur staðið á ynskilistanum hjá teimum leingi, sigur Kjartan Dam Joensen, yvirtollari.



*- Vit royna alla tíðina at gera tað tórførari og tórførari at smugla rúsevni til Føroya, sigur Kjartan Dam Joensen, yvirtollari*

Í hesum sambandi hevur tollvaldið nú fingið elektroniska atgongd til allar ferðafólkalistarnar hjá Atlantsflogi og hjá Norrønu,

- Hetta er eitt amboð, sum tollvaldið í okkara grannalondum hava og sum er neyðugt fyri at hava eitt neyvt eftirlit við smuglarum, sigur Kjartan Dam Joensen.

At tollvaldið nú kann fara beinleiðis á telduna og síggja ferðafólkalistarnar hjá Atlantsflogi og Norrønu, merkir, at nú ber tað til at hava neyvt eftirlit við, hvør ferðast til og úr Føroyum.

Hetta merkir eisini, at tollvaldið kann fylgja við, um tað er nakar, sum ferðast merkiliga ofta.

- Yvirhøvur verður eftirlitið nógv lættari, tá ið vit alla tíðina síggja, hvør ferðast til og úr Føroyum, sigur Kjartan Dam Joensen.

# Sjálvstøðugan limaskapur

**Nú Nordens Sprogråd verður umskipað á nýggjárinum, fáa Føroyar sjálvstøðugan limaskap í nevndini í nevndini**

- Í sambandi við at norðurlendska málnevndin Nordens Sprogråd á nýggjárinum verður umskipað til eina serfrøðinganevnd í norðurlendskum málspurningum, hava Føroyar fingið sjálvstøðugan limaskap á jøvnum føti við hini norðurlondini í ráðgevaranevndini í málspurningum Ekspertgruppen Nordens Sprogråd, stytt ENS.

Tað upplýsir Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, í tíðindaskrivi.

Hon sigur, at upprunaætlanin var, at Føroyar, Grønland, Áland og umboð fyri Samar skuldu fáa eygleiðarastøðu við talurætti, men ikki atkvøðurætti.



*Hetta hevur sera stóran týdning fyri okkum, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna*

- Hetta kundi eg ikki góðtaka, og boðaði tískil frá á Norðurlandaráðsfundinum í Stockholmi í heyst, at Føroyar góðtóku einki annað enn fullan limaskap við atkvøðurætti í nýggju málnevndini ENS, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon sigur, at hetta hevur nú eydnast, og frígjadagin fekk Mentamálaráðið boð um at koma við uppskoti um lim og varalim til serfrøðinganevndina í málspurningum ENS, áðrenn fríggjadagin 23. januar 2009.

Serfrøðinganevndin verður vald av Nordisk Ministerråd (MR-U) eftir uppskoti til nevndarlim frá undirvísingarministeriinum í einstøku londunum. Í nevndini sita 10 umboð.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna er sera fegin um, at tað hevur eydnast okkum at fáa sjálvstøðuga umboðan á jøvnum føti við hini Norðurlondini í hesi týdningarmiklu serfrøðinganevndini, tí málið og málspurningurin er ógvuliga týdningarmikil táttur í okkara samleika, og eingin annar kann umboða okkum á hesum økinum uttan vit sjálvi við fullum tali- og avgerðarrætti.

-áki-



*Næsta summar mugu gøtufólk og leirvíkingar mugu sjálvir rinda fyri sítt G-festival atgongumerki, eins og øll hini*

# Gøtufólk gjalda

**Tá ið G-festivalurin verður aftur í summar, verða tað bara tey allarnærmastu, sum sleppa ókeypis inn. Hetta er prísurin fyri at hava lagt saman við Leirvík**

FESTIVALUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fyrireikingarnar til G-Festivalin eru byrjaðar, hava fyriskipararnir gjørt púra greitt, at nú mugu gøtufólk eisini gjalda fyri síni atgongmerki sjálvi.

- Nú kommunan er blivin so stór, er ikki longur sannlíkt, at hon fer at rinda atgongumerki til allar borgararnar, siga fyriskipararnar í brævi til øll húski í kommununi nú um dagarnar.

Tað, sum sipað verður til, er at nú hava Gøta og Leirvík lagt saman-og hetta var so ein av prísunum fyri samanleggingina.

Tað verða bara tey, sum búgva á sjálvum festivaløkinum, mitt í Syðrugøtu, sum fáa ókeypis atgongumerki.

Annars verða borgararnir í Eysturkommununi javntstillaðir við øll hini og tað merkir, at teir mugu sjálvir keypa sær atgongumerki.

Men fyriskiparanir siga, at fyri at takka fyri tað farna og fyri at byrja samstarvið í nýggju stórkommununi væl, bjóðaðu tey fólki í Eysturkommununi atgongumerki til G-festivalin fyri serprís um vikuskiftið, sum fyriskipararnir taka til.

Tað merkir, at leygardagin og sunnudagin kundu fólk í Gøtu og í Leirvík keypa atgongumerki til G-festivalin fyri 595 krónur.

Annars kosta tey 695 krónur í forsølu, men beint áðrenn festivalin kosta atgongumerkini 995 krónur.